## Holst og teir liggja fram við

Lyngby hevur av álvara sett ferð ímóti toppinum í næstbestu donsku deildini. Tað kemur óvart á tey flestu, at Lyngby skal fáa so góð úrslit, men í løtuni gongur sum eftir ánni hjá teimum. Christian Holst Lamhauge, sum hevur spælt ein landsdyst fyri Føroyar, er ein av spælarunum á liðnum, og mikukvøldið vann Lyngby 2-1 ímóti HIK. Morten Norstrand skoraði bæði málini hjá Lyngby. Um Lyngby nú vinnur sínar tveir útsettu dystir, kunnu teir koma upp á javnt við Vejle, sum liggur næstfremst í donsku 1. deild.

**-ek**

## Stóri fingið vánaliga byrjan

Fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin í fótbólti, Henrik Larsen, hevur fingið vánaliga byrjan í nýggja starvinum sum venjari hjá Holbæk. Áðrenn hann tók við leiðsluni í Holbæk, sum er oddalið í triðbestu donsku deildini, hevði liðið bert tapt tveir dystir. Nú hevur Larsen havt leiðsluna í tveimum dystum, og Holbæk hevur tapt báðar. Harvið er trýst lagt á Holbæk í stríðnum um uppflyting til næstbestu deildina.

– Her er einki galið. Eg havi bara vant liðið einaferð og havi spælt tveir dystir. Eg skal líka læra spælararnar at kenna. Nú skulu vit bara hava høvdini upp, tí vit spæla aftur sunnudagin, sigur Henrik Larsen við BT.

-ek

# auppgerðini



Mynd: HB-B36

*Talan var fyri tað mesta um ein intensan - men ikki serliga væl spældan - dyst, tá grannafeløgini í Havn dystaðust mikukvøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Serliga grov dømi um hetta vóru mongu fríspørkini, sum Mikkjal Thomassen slapp at gera, eftir at hann hevði fingið - sera bíligt - gult kort, og niðursparkanina av Mortan úr Hørg, sum Símin Hansen framdi undir nøsini á dómaranum.

Tað er sjáldan ætlanin, at dómarin skal koma í fokus, men tað kom hann í ólukkumát mikudagin. Og tað er sjáldan serliga sunt fyri ein fótbóltsdyst.

## FAKTA

**HB-B36 2-0 (0-0)**
1-0: Rasmus Nolsøe, 66.
2-0: Rókur av F. Jespersen (br.), 90.
**Dómari:** Lassin Isaksen
**HB:** Bárður Johannesen - Mortan úr Hørg, Vagnur M. Mortensen, Rasmus Nolsøe, Janus M. Joensen - Emil N. Leifsson (Ólavur S. Í Ólavsstovu, 46.), Kári Nielsen, Rókur av F. Jespersen - Jákup á Borg, Páll M. Joensen (Johan Ejvind R. Moritsen, 46.), Tór-Ingar Akselsen (Svenn F. Jacobsen, 87.)
**Gult kort:** Kári Nielsen
**B36:** Jákup Mikkelsen - Kenneth Jacobsen, Bárður H. Joensen, Klæmint Matras, Alex Jose dos Santos - Ingi Højsted (Johan V. Gunnarsson, 12.), Mikkjal Thomassen (Herbert í Lon Jacobsen, 69.), Hanus Thorleifsson, Johan Ellingsgaard - Símin Hansen (Okeke Obele Onyebuchi, 69.), Amed Sylla Davy
**Gult kort:** Mikkjal Thomassen, Símin Hansen
**Reytt kort:** Alex José dos Santos

## Vit máttu vinna



Eftir dystin mikukvøldið var HB-liðskiparin, Janus M. Joensen, skjótur at ásanna, at trýstið á hansara liðið var stórt undan dystinum.

– Tað var »knall eller fald« hjá okkum. Taptu vit, so vóru níggju stig upp til B36, og so vildi tað verið mest sum vónleyst at dystast um nakað gullmerki í ár. Tí vit vita, at teir ikki fara at missa alt ov nógv stig á vegnum. Hinvegin kundu vit við einum sigri minka munin í trý stig, og tíbetur eydnaðist tað okkum eisini.

*Og gjørdist dysturin eins harður, sum tit høvdu roknað við?*

– Harðari, um nakað. B36 hevur eitt gott lið, og teir góvu seg allir 100%. Eisini eftir at teir vórðu ein færri. Sjálvandi hjálpti tað okkum væl, at vit stutt eftir løgdu okkum á odda, men vit vóru alla tíðina kroystir. Og Bárður hevur einar tvær fínar bjargingar.

*Men tit høvdu eisini tykkara møguleikar?*

– Ja, Jákup skal nokk skora upp á handan møguleikan, og so eru eisini aðrir størri og minni kjansir. Men tað var ikki, fyrr enn Rókur skorar upp á hatta straffið, at eg kendi meg tryggan. Tá visti eg, at sigurin var heima. Og nú ræður um hjá okkum at halda fast í góðu gongdini, staðfesti Janus M. Joensen.

**-mørk**

## Ein tóm kensla



Tað var ein mest sum útlúgvaður Sigfríður Clementsen, sum sat á venjarabeinkinum hjá B36, tá dysturin móti HB var av. Tað stóð greitt, at sálarligu aldurnar høvdu gingið høgt gjøgnum dystin. Nakað sum eisini gjørdist sjónligt, tá hann uppøstur mátti togast frá dómaranum eftir orðadrátt teirra millum.

Og hann var eisini skjótur at staðfesta, at eftir hansara tykki høvdu hann og hansara menn uppiborið betri hetta mikukvøldið.

– Tú kennir teg púrasta tóman at sita so. Eg fái ikki sett ein fingur á innsatsin, sum mínir menn leggja í dystin. Hóast vit tíðliga verða skerdir, tá Ingi fer út, so haldi eg, at vit alla tíðina hava tamarhald á teimum.

– Men tá vit so fáa eitt reytt kort, sum er púrasta burturvið, og tá HB eftirfylgjandi skorar, hóast talan er um stórt fríspark móti Jákupi, verður tað tungt. Men vit royna at trýsta kortini. Vit fremja nakrar offensivar útskiftingar og tað gevur eisini úrslit í nøkrum góðum møguleikum, sum vit helst skuldu skorað uppá, men tað gekk bara ikki. Og tá teir so eisini fáa eitt bíligt straffi, so er tann søgan av.

Sigfríður legði soleiðis ikki lok á, at hann helt lítið um dómaraavrikið. Eitt avrik, sum hann helt vera langt undir lágmark.

– Hatta er púrasta burturvið. Tú hevur tvey lið, sum í royndum og veru vilja sleppa at spæla fótbólt, men tann royndin verður púrasta tileinkisgjørd. Har var púrasta eingin linja í dømingini, og tíverri verða tað vit, sum verða offur teimum avgerandi feildómunum. Og tá tú somikið markant hevur nakrar dómaraavgerðir ímóti tær, so verður tað óluksáliga tungt. Eisini hóast eg eri 100% nøgdur við innsatsin hjá hvørj um tí einasta av mínum spælarum, segði altso Sigfríður Clementsen.

**-mørk**